



at arbeiða saman við so dugnaligum fólki.

Vakri pallurin hevur fylgt vid teimum allan vegin, og hevur sæd líka út - líkamikið hvar tey hava verið.

## Triðja árið

Tær tríggjar Shirley Clamp, Sanna Nielsen og Sonja Alden - ella "3S", sum tær eisini verða nevndar - hava gjørt hesa konsertferðina tvær ferðir áður. Í fjør høvdu tær ein manligan sangara vid, Måns Zelmerlöf, og í ár hevur hann fingið kenda sjónleikaran Björn Kjellman og Brandur Enni afturat sär.

- Eg plagi at kalla teir fyri Bjørn og Brenny, segdi Måns Zelmerlöf skemtandi á pallinum. Sjálvandi hugsaði hann um víðagitnu ABBA limirnar Björn og Benny!

Tey seks skiftast um at vera á pallinum, men syngja eisini nógv saman. Eitt tað stuttligasta var "Disney-medley" við kendum sangum úr teknifilmum hjá Disney. Ein stór trilla var rulla inn á pallin og nál og tráður var í somu stødd. Brandur setti seg á trilluna og sang millum annað "músa-sangin" úr Askepot.

Hvørju ferð Brandur kom inn á pallin var okkurt um Føroyar og hansara samband til heimlandið nevnt. Brandur sjálvur gjørdi eisini eitt sindur av gjøldur burtur úr, at í Føroyum er ikki so nógv at gera enn at fiska og skriva tónleik, og at fiska hevur hann ongantíð dugað, so tí fór hann undir at skriva tónleik.

Sangurin "Góða sig mær", sum Brandur byrjaði sína framførslu við, var ikki einasti føroyski sangur, áhoyrararnir sluppu at hoyra. Sjónleikarin Björn Kjellman byrjaði brádliga at syngja gamla "Aldan" hjá Anniku Hoydal - Brandur tók undir við honum, og áskoðarirnir klappaðu við.

- Og vilja tit vita, hví eg dugi hendan sangin? Jú, hann bleiv nr 4 í tí danska grand prixinum 1979, við Anniku Hoydal, greiður Björn Kjellman frá.

Björn Kjellman vísur síðani síni kynstur innan Grand Prix vitan - hann dugir hvønn einasta sang, ið er sungin í Grand Prix síðan 1956. Áskoðarirnir rópa land og árstal og hann syngur.

## Í eini boblu

Brandur hevur bara rós at bera hinum sangarunum og teimum, ið fáast við alt rundan um konsertirnar.

- Tað kennist, sum eg havi verið inni í eini boblu, meðan vit hava gjørt hesa konsertferðina. Alt hevur fungera so væl, og vit eru borin á lógvum, har vit eru komin, sigur hann.

Hóast konsertirnar hava verið nógvar og tættar hevur ikki bilað vid røddini hjá nøkrum av sangarunum. Brandur syngur tríggjar sangir sjálvur.

Beatles lagið "Merry Christmas" og hansara egna yndlingslag "O helga natt" endar hann við.

Hann náddi eisini at vísa eitt nýtt talent á pallinum - sum trompetspælari. Tað var vakurt og jólaligt!

Nú er henda konsertferðin liðug, og Brandur á veg heim til Föroya.

Á jólum hevur hann ikki tær stóru ætlaninar.

- Eg og beiggi mín Tróndur ætla at syngja í kirkjuni á Tvøroyri fyrsta jóladag, sigur hann.

Tá hann kemur aftur til Svøríkis í januar byrjar arbeiðið við eini nýggjari stakfløgu.